# Konsert, café og kjak

Undir heitinum “Ungdómur og ávirkan”, skipar Margarinfabrikkin fyri alternativum politiskum fundi mánakvøldið. Kvøldið verður skipað sum konsert, café og kjak. Linda Petersen, Fríði Bjørgvin og Guðrið Hansdóttir leggja fyri við tónleiki kl. 19.45. Seinni byrjar kjakið við yngstu valevnunum úr hvørjum flokki. Hesi eru Hans Norðfoss (A), Maj-Britt Jacobsen (B), Sunneva Mohr úr (C), Kristian Eli (Gissa) Zachariassen (D), Tjóðhild Patursson (E), Tóri Højgaard (H) og Bergur Johannesen (L). Hóast tiltakið serliga er ætlað ungdóminum, eru øll hjartaliga vælkomin oman í Margarinfabrikkina mánakvøldið.




# Høgni og Edla funnu Staðið

Ungdómurin í Vestmanna hevur tikið sera væl ímóti kærkomna tilboðnum, sum nýggja ungdómshúsið í bygdini er. Og nú hevur ungdómshúsið eisini fingið navn. Gott og væl 150 uppskot komu inn, tá navnakapping varð útskrivað, og vinnararnir vóru tey bæði Edla Jacobsen og Høgni Waag Høgnesen. Tey búgva síð um síð í Vestmanna, og uttan at vita av hvørjum øðrum, høvdu tey bæði latið sama navnauppskot inn: “Staðið”. Pauli Magnussen er leiðari á Staðnum, og hann sigur at tørvur hevur verið á hesum tilboðnum. Staðið hevur bæði sjónvarp og teldur, og Pauli Magnussen sigur, at hansara dreymur er at gera eini venjingarhøli í Staðnum eisini.

# rúspolitikk






*Frá politiska fundinum í Miðlahúsinum í gjárkvøldið um rúspolitikk*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

venda aftur til gomlu skipanina við rúsdrekka- og narkotikaráðnum.

## Ringt at stýra løgregluni

Tað var ein stórur áhugi millum áhoyrararnar í Miðlahúsinum at seta fram spurningar, og har vórðu eisini settir bæði nógvir og viðkomandi av slagnum. Ein, sum setti fram spurningar, var Carl August Wang, ið sum kunnugt hevur arbeitt innan økið í mong ár. Hann vildi vita, hvat politikararnir vildu gera við mongu og afturvendandi lógarbrotini á rúsdrekkalógina, har tey ungu alt ov lætt fingu fatur á rúsandi løgi.

Har var rættiliga breið semja um, at ilt var at gera nakað við hetta øki, tí at ansa eftir slíkum hoyrir løgregluni til, og hon er sum kunnugt donsk. Men Finnur Helmsdal vísti eisini á, at sjálvt um løgreglan hevði verið føroysk, hevði ikki borið til hjá politikarum at blanda seg í, hvussu løgreglan útførir sítt arbeiði, og hvussu hon raðfestir.

Nakað annað er so, at tað átti at verið kravt samleikaprógv frá fólki, tá tey keypa í Rúsuni ella á skeinkistøðum, trupulleikin er bert, hvør ið so skuldi hildið eftirlit við hesum, løgreglan ella ein loyvisnevd við víðkaðum heimildum.

Tá tað kemur til ung undir 18 ár, so má tað vera uppgávan hjá foreldrunum at asna eftir børnum sínum, men semja var um, at júst hetta var ógjørligt at stýra, tí vildu tey ungu hava fatur á rúsdrekka, so fingu tey tað eisini so ella so.

Men at rúsdrekka er ein trupulleiki eisini í Føroyum, var eingin í iva um. Ført varð eisini fram, at allarflestu lógarbrot eru rúsdrekkarelaterað.

Kjakið kom eisini inn á viðgerðina av rúsevnismisnýtarum, og trupulleikan við, at einki »halfway house« var í skipanini, sum kundi tryggjað fólki eina varisliga slúsan út aftur í samfelagið, har tey í dag meiri ella minni bara verða tveitt fyri úlvarnar aftur.

## Distillera í Føroyum

Kjakið var drúgvt og áhugavert, og fleiri viðkomandi spurningar vóru uppi at venda. Ein tann alarmest áhugaverdi var, hví vit ikki bara framleiða tað rúsdrekka – ella í hvussu er part av tí rúsdrekka – sum vit nýta, her í Føroyum.

Og her var fyri fyrstu ferð verulig ósemja millum panelluttakararnar. Alfred Olsen frá Sambandinum, Alice Højsted frá Sjálvstýrinum og Jaspur Langgaard frá Miðflokkinum tóku greiða frástøðu frá, at vit fara undir at bryggja sterkt her í Føroyum. Tey mettu øll trý, at góvu vit loyvi til at bryggja sterkt, var hetta ein glíðibreyt at koma út á, sum fór at føra økta sølu frá bryggjaríunum við sær, eins og tilfeldið er við ølbryggjaríunum.

Hinir tríggir í panelinum, Hans Norðfoss úr Fólkaflokkinum, Kristian Magnussen úr Javnaðinum og Finnur Helmsdal úr Tjóðveldinum, dugdu hinvegin als ikki at síggja nakað forgjørt í at framleiða nakað í Føroyum, sum vit kortini fluttu inn í landið. Teir dugdu heldur ikki at skilja argumentini um eina glíðibreyt, tí alt er ein spurningur um at lóggeva á skynsaman hátt.

- Tá myndugleikarnir vita, hvat fer inn gjøgnum einu hurðina og út aftur gjøgnum hina, og tá teir vita, hvar hetta fer, so dugi eg ikki at síggja nakran trupulleika í hesum, segði Kristian Magnussen.

Teir førdu somuleiðis fram, at hetta beinleiðis kundi verið gott fyri fjølbroytnið í vinnulívinum, og geva landinum enn eitt bein at standa á.

Tíðin flýgur, tá tú hevur tað hugnaligt, og soleiðis var eisini í Miðlahúsnum í gjárkvøldið. So tað var einki at undrast yvir, at farið varð korter út um ásettu tíðina, áðrenn givist varð. Og tað var aðalskrivarin í Bláa Krossi, Hjalmar Hansen, ið fekk æruna av at enda fundin við at taka samanum

- Eg fegnist um, at tað eru greiðar ábendingar um, at flokkarnir vilja gera nakað við spurningin um ein rúsevnispolitikk. Eg hald, at vit eru vorðin mikið klókari og hava fingið nógv burtur úr fundinum í kvøld. Eg havi, segði Hjalmar Hansen, aðalskrivari í Bláa Krossi.




Skeið 21. februar 2008

**Børn og strongd**

**- vit seta fokus á børn og strongd, ein alsamt vaksandi trupulleiki**

Strongd er ikki nakað, vit vaksnu hava einkarrætt uppá. Børnini eru tiverri væl við, og øll børn kunnu verða trýst út í støður, sum gera, at tey gerast strongd. Summi eru tó í størri vanda, enn onnur. Eitt nú børn, har foreldrini fara hvør til sítt, serliga um samskiftið millum foreldrini er vánaligt. Jú betur vit kenna tekin uppá strongd, jú skjótari kunnu vit hjálpa og harvið minka um trupulleikan, áðrenn hann gerst ov stórur.

Skeiðsleiðararnir fara at seta fokus á, hvat strongd er, hvørji tekin vit serliga skulu vera varug við og hvussu ávirkar strongd børn okkara. Á skeiðnum verður m.a. arbeitt við konkreta arbeiðsamboðnum "mestringscirkelen". Hetta amboðið kann brúkast sum ein hjálp til at vísa á, hvussu man hjálpir børnunum best í pedagogiska arbeiðinum. Hugt verður eisini at, hvat fakfólk, saman við foreldrum, kunnu gera, fyri at fáa børnini at trívast og støðugt menna teirra mótstøðukraft móti strongd.

**Skeiðið vendir sær til fólk,** sum arbeiða við børnum. Starvsfólk á dagstovnum og frítíðarskúlum, pedagogar og hjálparfólk, lærarar, dagrøktarar, sjúkrarøktarfrøðingar, sálarfrøðingar, fosturforeldur, barnaverndarlimir og starvsfólk innan umsiting á sosialum deildum.

**Tilmeldingarfreist 4. februar 2008** - Avmarkað pláss!

Tekna teg og les meira á www.synergi.fo ella ring 22RING (227464) | Synergi